**ÚTBOÐ**

# Nýggjur dekkskrani til Smyril

**Teknisk kravspecifikatión og prísuppgerð**

Strandfaraskip Landsins

**Týðandi tíðar- og faktureringartreyt**

Niðurtøka av verandi krana, møgulig styrking/tillaging av undirlagi og fundamenti, uppseting, tilkobling, ígongdseting, load test og endalig góðkenning verða ikki framd fyrr enn undir ætlaðu dokkingini hjá Smyrli í oktober 2028. Hesir postar skulu prísásetast serstakt við 2028 sum kostnaðargrundarlag og verða ikki faktureraðir/goldnir við levering av krananum, men fyrst tá viðkomandi arbeiði er framt og góðkent.

# 1. Endamál og vavið á veitingini

Strandfaraskip Landsins (SSL) ynskir tilboð upp á levering av einum nýggjum dekkskrana til ferjuna Smyril. Veitingin skal fevna um krana, neyðuga hjálpiútgerð, tekniska dokumentatión og certifikat, umframt tey arbeiði, ið skulu fremjast umborð í sambandi við dokkingina í oktober 2028.

## 1.1 Fullfíggjað veiting

Endamálið er at fáa eina fullfíggjaða og rakstrarklára loysn. Bjóðari hevur ábyrgd av at upplýsa øll neyðug interface, fortreytir og arbeiði, sum krevjast fyri at kranin kann setast upp, roynast og takast í rakstur. Alt, ið ikki er íroknað, skal vera týðiliga nevnt sum undantak í tilboðnum.

**Skilnaður millum levering og arbeiði í 2028**

Sjálvur kranin og avtalað útgerð kunnu leverast undan dokkingini. Arbeiði umborð, sum er merkt "2028" í prístalvuni, skal tó ikki fakturerast fyrr enn arbeiðið er framt og góðkent í oktober 2028. Prísurin fyri hesi arbeiði skal gerast upp við støði í ætlaða kostnaðarstøðinum í oktober 2028 og skal vera bindandi sambært tilboðnum, uttan greitt tilskilaða og góðtikna prísregulering.

# 2. Teknisk minimumskrøv

| Nr. | Krav | Minimumskrav | Bjóðari: Comply / Deviate + viðmerking |
|---|---|---|---|
| 2.1 | Bummur | Stívbummur (fixed/stiff boom). Arbeiðsradius 12 m. | |
| 2.2 | Lyftikapasitetur | SWL 2,0 tons við 12 m radius. Kranin skal ikki vera dimensioneraður til ella loyva lyfti omanfyri 2,0 tons SWL við 12 m radius, vegna dimensjoneringina av verandi undirstøði/fundamenti. Fullt load chart/lyftidiagram skal fylgja tilboðnum og skal greitt staðfesta hetta. | |
| 2.3 | Sving | 360° sving. Upplýsast skal, um svingið er kontinuerligt/óavmarkað, og um nakrar avmarkingar eru. | |
| 2.4 | Maritim/offshore góðkenning | Kranin skal vera framleiddur, royndur og certifiseraður sambært standardi fyri maritimar/offshore kranar, sum er viðurkendur í Norðuratlantshavi/Norðurevropa. Bjóðari skal upplýsa nágreiniliga standard, útgávu, certifiserandi/óheftan triðjapart og vavið á certifiseringini. | |
| 2.5 | Yvirflatuviðgerð | Korrosjónsverja egnað til harðført maritimt umhvørvi. Coating-/málingsskipan skal lýsast. | |

| Nr. | Krav | Minimumskrav | Bjóðari: Comply / Deviate + viðmerking |
|---|---|---|---|
| 2.6 | Fundament | Nýggi kranin skal so vítt møguligt passa til verandi fundament. Bjóðari skal staðfesta interface og upplýsa neyðugar tillagingar/styrkingar. | |
| 2.7 | Fundamentsdata | Fundamentstekning, festiboltar, eginvekt, tyngdarpunkt og maksimalar design-/fundamentskreftir fyri viðkomandi load cases skulu latast. Design-/fundamentskreftir skulu vera grundaðar á kravda kapasitetin, har SWL við 12 m radius er 2,0 tons og ikki hægri. | |
| 2.8 | HPU | Innbygd Hydraulic Power Unit (HPU), hóskandi til 50/60 Hz. Spenningur, effekt, startstreymur og onnur neyðug el-data skulu upplýsast. | |
| 2.9 | Start-/stýriskáp | Start- og stýriskáp skal vera íroknað og egnað til maritimt umhvørvi. IP-grad og annað relevant data skulu upplýsast. | |
| 2.10 | Fjarstýring | Komplett fjarstýring við neyðstoppi og viðkomandi trygdarfunktiónum skal vera íroknað. Backup-/lokal stýring skal lýsast. | |
| 2.11 | Spæl/vinsja | Komplett spæl/vinsja skal vera íroknað. Bjóðari skal upplýsa kapasitet, wire, wire longd, slag av króki og aðra viðkomandi útgerð. | |
| 2.12 | El-sambinding | Neyðug elektrisk íbinding av krananum skal vera íroknað. Markið millum leveransu hjá bjóðara og verandi skipsskipan skal lýsast. | |
| 2.13 | Trygd | Kranin skal hava neyðugar limit-/overload- og neyðstoppfunktiónir sambært valda standardinum. Bjóðari skal lýsa trygdarskipanirnar. | |
| 2.14 | Umhvørvisdata | Bjóðari skal upplýsa loyvt arbeiðstemperaturøki, vindavmarkingar og aðrar operationalar avmarkingar. | |

## 3. Arbeiði undir dokking í oktober 2028

Hesin partur av veitingini verður eftir ætlan framdur undir dokkingini hjá Smyrli í oktober 2028. Bjóðari skal í tilboðnum leggja fram metta samlaða arbeiðstíð/dagatalið.

- Mobilisering og fyrireiking til arbeiðið umborð.
- Trygg niðurtøka av verandi krana, íroknað neyðug frákobling.
- Flyting/burturbeining av gamla krananum sambært nærri avtalu við SSL.
- Uppmáting og endalig staðfesting av verandi fundamenti/interface.
- Neyðug tillaging og/ella styrking av undirstøði/fundamenti innan fyri tær fortreytir, ið fylgja av kravda kranakapasitetinum. Kranin skal ikki hava SWL omanfyri 2,0 tons við 12 m radius.
- Uppseting, alignment og mekanisk festing av nýggja krananum.
- Hydraulisk og elektrisk tilkobling, íroknað neyðugt forbindilsi innan avtalað interface.
- Ígongdseting og funktiónsroyndir av krana, HPU, stýring, fjarstýring, spæl/vinsju og trygdarfunktiónum.
- Load test/belastningsroynd við neyðugari testútgerð og certifiseringskostnaði.
- Endalig góðkenning, handover og levering av endaligari dokumentatión/as-built data.

**2028-fakturering**

Onki arbeiði í hesum parti skal fakturerast við levering av sjálvum krananum. Fakturering kann fyrst fara fram eftir, at viðkomandi arbeiði er framt í oktober 2028 og góðkent av SSL. Í prístalvuni skal hvør 2028-postur vera sjálvstøðugt prísásettur.

## 4. Certifisering, royndir og dokumentatión

Bjóðari skal í tilboðnum navngeva standard og certifiseringsgrundarlag. Ein vanligur referansustandardur fyri general-purpose offshore cranes er EN 13852-1. Bjóðari kann tó bjóða samsvarandi viðurkendan standard, treytað av at hann verður nágreiniliga upplýstur og dokumenteraður.

- Tekniskt data sheet og GA-/máttekning.
- Load chart/lyftidiagram.
- Fundamentstekningar, boltamynstur og design-/fundamentskreftir.
- Hydraulikkdiagram og el-diagram.
- Manualir fyri rakstur, viðlíkahald og feilfinning (operation, maintenance and troubleshooting).
- Coating-/korrosjónsverju-specifikatión.
- Certifikat og testprotokollir fyri krana og kritiskar komponentar.
- Dokumentatión fyri fjarstýring, trygdarfunktiónir og overload/limit-skipanir.
- Endalig load-test rapport og certifikat eftir uppseting.
- As-built dokumentatión eftir arbeiðið í 2028.

## 5. Garanti, service og eykalutir

- Bjóðari skal upplýsa garantitíð fyri krana, komponentar og installatión.
- SSL ynskir, at garanti fyri funktionalitet og arbeiði/uppseting byrjar við endaligari commissioning og góðkenning í oktober 2028. Um bjóðari hevur aðra garantitreyt, skal hetta upplýsast greitt sum frávik.
- Møguleikar fyri tekniska support, service og response time skulu upplýsast.
- Bjóðari skal upplýsa væntað tíðarskeið, har kritiskir eykalutir eru tøkir.
- Viðmælt initialt spare-parts kit skal upplýsast og prísásetast serstakt.
- Um kranin verður goymdur fram til dokking, skulu krøv til preservation, goymslu, periodiska inspection og møguliga re-preservation upplýsast.

## 6. Tíðarætlan og levering

- Bjóðari skal upplýsa leveringartíð fyri kranan frá bílegging.
- Neyðugar interface-/fundamentstekningar og fundamentskreftir skulu latast í so góðari tíð, at SSL kann fyrireika dokkingina í 2028.
- Bjóðari skal upplýsa seinasta neyðuga tidspunkt fyri endaliga uppmáting/site survey.
- Mett arbeiðstíð í dokk fyri niðurtøku, fundamentarbeiði, uppseting, royndarkoyring og load test skal sundurgreinast.
- Bjóðari skal upplýsa allar fortreytir fyri arbeiði frá skipasmiðju/SSL, t.d. kranahjálp, stillads, sveising, el-veiting, hot-work, lyftiútgerð og arbeiðsloyvir.

## 7. Prístalva

Tilboðið skal prísásetast í tveimum høvuðspørtum: (A) levering av krana við tilhoyri í 2027 og (B) samlað montering/installatión í sambandi við dokkingina í oktober 2028. Tað er ikki krav, at niðanfyri nevndu undirpostar verða prísásettir hvør sær. Teir skulu tó vera partur av scope og geva bjóðara eitt greitt grundarlag at meta samlaða prísin út frá. Gjaldstreytir verða ásettar serstakt.

Bjóðari skal bert upplýsa samlaðan prís fyri A og B omanfyri, umframt samlaðan tilboðsprís. Undirpostarnir eru scope-lýsing og skulu ikki prísásetast hvør sær.

**7.3 Samlað prísuppgerð**

• Demobilisering

• Endalig góðkenning, handover og as-built dokumentatión

• Load test, neyðug testútgerð og certifiseringskostnaður

• Ígongdseting (commissioning) og funktiónsroyndir

• Elektrisk íbinding og interface

• Hydraulisk íbinding

• Uppseting, alignment og mekanisk festing av nýggja kprananum

• Neyðug tillaging/styrking av undirstøði/fundamenti

• Uppmáting og endalig interface-staðfesting

• Burturbeining/handfaring av gamla krananum sambært avtalu

• Niðurtøka og frákobling av verandi krana

• Mobilisering og fyrireiking til arbeiðið umborð

**7.2 Montering/installatión undir dokking í oktober 2028**

• Viðmælt initialt spare-parts kit, um boðið

• Flutningur og levering av krananum við tilhoyri

• Teknisk dokumentatión og certifikat, sum hoyra til leveraðu útgerðina

• Innbygd HPU, start- og stýriskáp

• Fjarstýring og backup/lokal stýring

• Spæl/vinsja, wire og krókur

• Kranur, komplettur við kravdari standardútgerð

**7.1 Levering av krana við tilhoyri, 2027**

| Postur | Høvuðsveiting | Tíðarskeið | Samlaður prísur | Viðmerking / frávik |
|---|---|---|---|---|
| A | Levering av krana við tilhoyri | 2027 | | |
| B | Montering, installatión, royndir og endalig handover | Oktober 2028 | | |
| C | **SAMLAÐUR TILBOÐSPRÍSUR** | | | |

**Prísgrundarlag fyri 2028**

Allir B-postar skulu vera kalkuleraðir við støði í, at arbeiðið verður framt í oktober 2028. Um prísregulering verður kravd, skal mekanisman, indeks, basisdato og mark fyri regulering verða greitt lýst í tilboðnum. Um einki verður upplýst, verður prísurin mettur sum fastur/bindandi fyri ætlaða arbeiðið í oktober 2028.

## 8. Upplýsingar, ið skulu fylgja tilboðnum

- Útfylt kravtalva við Comply/Deviate og frágreiðing um øll frávik.
- Útfylt prístalva við gjaldoyra og galdandi prísfortreytum.
- Tekniskt datablad, GA-tekning og load chart.
- Navn og útgáva av viðurkendum maritim/offshore kranastandardi, sum kranin verður certifiseraður eftir, og navn á certifiserandi/óheftum triðjaparti.
- Greitt "Included in scope" og "Excluded from scope".
- Leveringartíð og uppskot til tíðarætlan fram móti dokkingini í oktober 2028.
- Mettir arbeiðsdagar og manning fyri hvønn høvuðspart av 2028-arbeiðinum.
- Garantitreytir, serviceupplýsingar og eykalutaviðurskifti.
- Yvirlit yvir fortreytir og arbeiði, sum SSL/skipasmiðjan skal veita.
- Gildistíð á tilboðnum.

## 9. Fyrivarni og frávik

Øll fyrivarni, teknisk frávik, kommersiell frávik og undantøk skulu vera savnað í einum serstøkum yvirliti í tilboðnum. Viðurskifti, sum ikki eru greitt tilskilað sum undantak, verða mett at vera íroknað, í tann mun tey eru neyðug fyri avtalaða, fullfíggjaða veiting.

## 10. Viðmerking um standard/góðkenning

Endaliga valið av certifiseringsstandardi skal staðfestast í sambandi við teknisku metingina av tilboðunum. Kravið er ætlað sum eitt performance-/dokumentatiónskrav til sjálvan kranan og ikki sum eitt krav um at flyta Smyril í annan klassa ella fáa eina nýggja nationala klassagóðkenning. Bjóðari skal prógva, at valda skipanin hevur viðurkenda og óhefta conformity/certifisering og er ætlað til samsvarandi maritim/offshore nýtslu.